# Kunngerðablaðið A

2009 Hefti 9

ISSN 0907-905X


Nr. 29 2. apríl 2009

## Kunngerð
## um
## merking av sjógvalistøðum og sigling nærhendis v.m.

Við heimild í § 31 og § 49, stk. 2 í løgtingslóg nr. 165 frá 21. desember 2001 um trygd á sjónum verður ásett:

**§ 1.** Kunngerðin fevnir um øll sjógvalibrúk í Føroyum. Eitt sjógvalibrúk fevnir um aliringar, fóðurflakar, fóðurslangur, akker, akkersboyur, línur, standarar og annan útbúnað.

*Merking*

**§ 2.** Øll sjógvalibrúk skulu vera merkt við ljósum sambært tilráðingini hjá IALA (International Association of Marine Aids to Navigation and Lighthouse Authorities). Ljósini skulu vera minst 2 metrar yvir sjónum. Eitt ljós skal vera á hvørjum enda á ytsta punkti, ið vendir út ímóti siglingarrennuni, sí fylgiskjal 1. Eru sjógvalibrúkini longri enn 100 metrar, skulu eyka ljós vera á ytsta punkti, ið vendir ímóti siglingarrennuni, soleiðis at tað eru í mesta lagi 100 metrar millum ljósini.

*Stk. 2.* Ljósini skulu hava fylgjandi fýrkarakterir:

1) Ljós, sum inngangandi før skulu hava um stýriborð:
   Fl.Y. 5s (**0,5**+4,5)
2) Ljós, sum inngangandi før skulu hava um bakborð:
   Fl(4).Y.10s (**0,5**+0,5+**0,5**+0,5+**0,5**+0,5+**0,5**+6,5)

Ljósini skulu síggjast í minsta lagi 2 fjórðingar.

*Stk. 3.* Rætningurin fyri inngangandi í føroyskum sjógvi er vístur í fylgiskjali ”Føroyar inngangandi”.

*Stk. 4.* Á hvørjum enda á ytsta punkti, ið vendir ímóti siglingarrennuni, skulu sjógvalibrúkini hava radarreflektor, ið er minst 2 metrar yvir sjónum.

*Stk. 5.* Hvør aliringur skal hava í minsta lagi 5 endurskin, 20x40 cm stór, sum skulu venda í ymiskar rætningar. Endurskinini skulu vera fest minst 1 metur yvir sjónum. Harafturat skulu fóðurslangur og akkersboyur merkjast við endurskinum, so vavið á alistøðini kemur fram, tá ið lýst verður á hana.

*Sigling nærhendis sjógvalistøðum*

**§ 3.** Tað er ikki loyvt óviðkomandi skipum og bátum at sigla nærri enn 50 metrar at sjógvalistøðum.

**§ 4.** Brot á §§ 2 og 3 í kunngerðini verður revsað við bót eftir § 49, stk. 2 í lóg um trygd á sjónum.

**§ 5.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 102 frá 29. august 2003 um merking av sjógvalistøðum og sigling nærhendis v.m.

Vinnumálaráðið, 2. apríl 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)


Kalsoy
Kunoy
Viðoy
Fugloy
Borðoy
Svínoy
Eysturoy
Streymoy
Mykines
Vágar
Koltur
Nólsoy
Hestoy
Sandoy
Skúvoy
St. Dímun
Suðuroy
Føroyar
Inngangandi
LANDSVERK

# Kunngerð um broyting í kunngerð um fiskiskap eftir havtasku og svartkalva við gørnum á føroysku landleiðunum

**§ 1**

Í kunngerð nr. 62 frá 17. september 2004 um fiskiskap eftir havtasku og svartkalva við gørnum á føroysku landleiðunum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, stk. 1, nr. 1, litra a, verður eftir 1. pkt. sett inn: „Dýpdaravmarkingin fevnir tó ikki um fiskiskap eftir havtasku á Ytsta Banka og á tí partinum av Ytra Banka, sum er vestan fyri 10°11' V og sunnan fyri 60°38' N.“

2) Í § 2, stk.1 verður eftir 1. pkt. sett inn: „Hetta er tó ikki galdandi fyri fiskiskap við gørnum á leiðum norðan fyri 62°39'N og vestan fyri 8°V.“

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, 3. apríl 2009

**Jacob Vestergaard (sign.)**
landsstýrismaður

/Andras Kristiansen (sign.)

Nr. 31 3. apríl 2009

**Kunngerð**
**um**
**avreiðing av livur og treytir fyri tillutan av eyka fiskidøgum**

Við heimild í § 29, stk. 10 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, við seinni broytingum, verður ásett:

**§ 1.** Kunngerðin fevnir um avreiðing av livur til virkingar í Føroyum frá fiskiførum í høvuðsbólkunum 2, 3 og 4, sbrt. § 28, og treytir fyri at fáa lut í eyka fiskidøgum í hesum sambandi.

**§ 2.** Í fiskiárinum 2008/2009 eru, fyri høvuðsbólkarnar 2, 3 og 4, tillutaðir ávikavist 127, 79 og 125 fiskidagar tilsamans millum tey fiskifør, sum avreiða livur.
*Stk. 2.* Fiskifar í høvuðsbólki 2, partrolarar, kann fáa 6 fiskidagar fyri tey fyrstu 10 tonsini av livur, sum verða avreidd. Fyri hvørji 4 tons, sum síðani verða avreidd, verða 2 eyka fiskidagar tillutaðir.
*Stk. 3.* Fiskifar í høvuðsbólki 3, línuskip, kann fáa 6 fiskidagar fyri tey fyrstu 5 tonsini av livur, sum verða avreidd. Fyri hvørji 3 tons, sum síðani verða avreidd, verða 2 eyka fiskidagar tillutaðir.
*Stk. 4.* Fiskifar í høvuðsbólki 4, útróðrarbátar yvir 15 tons, kann fáa 5 fiskidagar fyri tey fyrstu 1,5 tonsini av livur, sum verða avreidd. Fyri hvørt tons, sum síðani verður avreitt, verða 2 eyka fiskidagar tillutaðir.
*Stk. 5.* Um fiskidagar eftir stk. 1 ikki eru brúktir fyri 1. juni 2009, kunnu teir brúkast samsvarandi § 3.

**§ 3.** Í fiskiárinum 2008/2009 eru, fyri høvuðsbólkarnar 2, 3 og 4, tillutaðir ávikavist 42, 26 og 42 fiskidagar eyka at brúka í sambandi við verkætlanir um gagnnýtslu av livur, ella til serligar avtalur millum virki og fiskifør, ið hava til endamáls at gagnnýta livur.
*Stk. 2.* Fiskimálaráðið skal góðkenna møguligar verkætlanir ella avtalur millum virki og skip.
*Stk. 3.* Eykadagar verða tillutaðir, eftir at Fiskimálaráðið hevur givið sína góðkenning, og tá ætlaðu nøgdirnar av livur eru avreiddar.
*Stk. 4.* Um fiskidagar eftir stk. 1 ikki eru brúktir fyri 1. juni 2009, kunnu teir brúkast samsvarandi § 2.

**§ 4.** Fiskidagar sbrt. §§ 2 og 3 verða lagdir afturat fiskiloyvinum hjá viðkomandi fiskifari, tá Fiskimálaráðið hevur fingið skjalprógv frá keypara fyri, at ásettu nøgdirnar av livur eru avreiddar til virkingar í Føroyum.

**§ 5.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. september 2008. Kunngerðin fer úr gildi 31. august 2009.

Fiskimálaráðið, 3. apríl 2009

**Jacob Vestergaard (sign.)**
landsstýrismaður

/ Andras Kristiansen (sign.)

FØROYAPRENT